


*Premier League málverjin, Gunnar Nielsen, venur dagliga við stórum heimsstjørnum.*

# Munur á Arsenal og B1908

**A-LANDSLIÐIÐ Flennandi kundi Gunnar Nielsen staðfesta, at tað var stórur munur á at spæla móti Arsenal í Premier League og so móti B1908 í triðbestu donsku deildini. – Men tað er altíð deiligt at spæla við landsliðnum. Ikki minst, tá tað er so langt síðani eg havi spælt, sigur hann**

Enska Premier League er farin í summarfrí. Tað merkir, at Gunnar Nielsen í Manchester City hevur havt frí frá fótbólti í næstan ein mánað nú. Tískil var hann fegin um at sleppa á vøllin aftur, eisini hóast mótstøðuliðið ikki var Arsenal, men ein uppflytari í triðbestu donsku fótbóltsdeildini.

– Tað er øgiliga stórur munur á. Men tað er eisini munur á tí vit kappast um í Manchester City og á føroyska landsliðnum. Fyri meg er tað tó altíð deiligt at spæla á landsliðnum, sigur Gunnar Nielsen, sum ikki hevði tað stóra at gera í dystinum. Kortini metir hann, at hann fekk nakað burturúr.

– Sjálvandi havi eg havt meira at gjørt fyrr, men har var eitt lítið sindur og tað tók eg so. Men tað eru altíð hesar dystarstøðurnar, har eg má rópa, stýra og flyta meg, so eg helt tað var fínasta slag at spæla í dag, sigur málverjin á føroyska landsliðnum.

Í móti Luksemburg fríggjadagin kann roknast við, at tað verður heldur størri trýst á føroyska liðnum enn tað var í gjárkvøldið. Hesa uppgávuna er Gunnar Nielsen tó klárur til.

– Ja, tað eri eg. Eg venji við heimsstjørnum dagliga og havi bíðað eftir at sloppið at vart tað føroyska málið í nógv ár, so eg meti meg heilt víst vera kláran, sigur hann.

rolant@sosialurin.fo

## B1908 – Føroyar 0-1 (0-0):

# Landsdysturin var

**A-LANDSLIÐIÐ Fyri einaferð skyld var tað at meta sum eitt krav, at føroyska fótbóltslandsliðið vann dystin, teir skuldu spæla. Hetta gjørdu teir eisini og tí kann landsliðsvenjarin fegnast um ein sigur, 80 minuttir av dystarvenjing og at hann fekk høvi at síggja lutfalsliga ókend nøvn í landsliðshøpi. Annað kundi og skuldi venjingardysturin móti B1908 ikki brúkast til**




*SAS-liga leikarin Christian Holst Lamhauge, í nærdysti við B1908 liðskiparan.*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

Rólant Waag Dam

Páll Klettskarð, Viljormur Davidsen, Rógvi Poulsen, Pól Jóhannus Justinussen og Christian Restorff Mouritsen. Allir meira ella minni ókend nøvn í landsliðshøpi, men tað vóru menn sum hesar, Brian Kerr ynskti at síggja nærri við venjingardystinum móti B1908.

Nú dysturin er av, loysir tað seg ikki at brúka tíð og orku upp á at hugsa um, hvussu pínligt tað hevði verið, um føroyska landsliðið – okkara allar bestu leikarar – taptu fyri einum liði, sum stríðist fyri lívinum í triðbestu donsku fótbóltsdeildini. Enn minni hvussu tápiligt tað hevði verið, um til dømis Gunnar Nielsen fekk ein keðiligan skaða í móti einum slíkum liði.

Fakta er, at Føroyar vunnu dystin við einum máli móti ongum. Eingin fekk skaða undir dystinum, leikararnir sluppu at spæla saman undan venjingardystinum móti Luksemburg fríggjakvøldið og Brian Kerr fekk høvi at síggja tilsamans 17 mans á vøllinum.

- Overall a good exercise, staðfesti Brian Kerr eftir dystin. Ein ógvuliga beinrakin lýsing av dystinum, ið er at meta sum ein fín venjing – hvørki meira ella minni.

## Líkt landsdysti – og tó

Annars høvdu teir í B1908 gjørt sítt til, at søguligi dysturin, sum teir skrivaðu í leikskránni, fekk ein so landsdystarkendan dám sum gjørligt. Við inngongina til stadion hekk eitt føroyskt flagg, og undan sjálvum dystinum høvdu tey funnið lagið til tjóðsang okkara fram, soleiðis at hesin eisini varð sungin. Teir høvdu enn tá funnið eina fitta føroyska damu til at lesa føroyska liðið upp, og harvið ljóðaðu nøvn sum Egil á Bø, Bogi Løkin og Jóan Símun Edmundsson sum tey skuldu, og ikki so stuttligt, sum tey onkuntíð gera, tá føroyska landsliðið spælir á útivølli.

Hinvegin vóru eisini nógvir faktorar, sum vóru við at seta eina tjúkku striku undir, at tað var B1908, eitt botnlið í 2. division øst, sum var vertur. Eitt nú vóru hornfløggini smáar útgávur av Dannebrog og




*Venjararnir báðir eygleiða landsdystin, sum mest av øllum bert var ein fín venjing*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

stadionspeakarin lýsti í heilum við, at tú kundi keypa »kolde øl og varme pølser«.

## Veruligur venjingardystur

Fyrsta tekini um, at talan var um ein venjingardyst, var tá tað varð kunngjørt, at dysturin var tíggju minuttir styttri enn vant, soleiðis at hvør hálvleikur var 40 minuttir. Eftir hesa kunngerð fingu áskoðararnir ferð eftir ferð eina áminning um, at tað var ein